## SøluRásin á Skála

Fýra ítróttarfeløg á vestara armi á Skálafjørðinum, St.ÍF, Strálan, Skála Ítróttarfelag og Skála Róðrarfelag, skipa fyri árligu sølustevnuni SøluRásin í ítróttarhøllini á Skála 4. og 5. november. Umframt sýningar av øllum slagi verður sangur og tónleikur á skránni við nøvnum sum Lív Hansen, Jens Marna Hansen, Magna Christiansen, Lisu Frederiksberg og LM Band. Atgongumerkini eru lutaseðil, har til bera at vinna 10.000 krónur.

## Heyst og vetrarmótasýningin 2006

Vælumtókta heystmótasýningin hjá miðbýnum verðu í ár á nýumvælda Hotel Tórshavn. Hetta er samstundis vælkomið høvi at síggja nýggju matstovuna og at vísa, hvussu hon riggar til eitt størri tiltak. Á fjølbroyttu sýningini verður tað nýggjasta innan móta sýnt fram til børn, ung og vaksin.

Mótasýningin verður hóskvøldið 2. november kl. 19, og atgongumerkini fáast til keyps á Kunningarstovuni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Løgmaður á allahalgannadegi:

# Sjómaðurin hevur eina serliga støðu

**- Sum tigandi vitni standa minnisvarðar og kirkjugarðar í bygd og bý - á nesi og á tanga. Vit høgga nøvnini á okkara kæru í minnisvarðan og gravsteinin. Tað, sum longu er høgt í minnið okkara, avmyndast í grótinum. Tað stendur eftir tann farna, og tað fer at standa eftir okkum við, segði løgmaður á minningarhaldinum á Hotel Tórshavn í morgun**

MINNINGARDAGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun var minningarhald yvir tey sjólátnu á Hotel Tórshavn í Havn, sum siður hevur verið í mong ár.

Nógv fólk var samankomið til løtuna, bæði umboð fyri stovnar við atliti til sjóvinnu, umboð fyri feløg og nógv avvarðandi at fólki, sum farin eru á sjónum – bæði í farna ári og undanfarin ár.

Sangir vórðu sungnir, og løgmaður og dómpróstur søgdu nøkur orð við høvið.

Eftir løtuna á Hotel Tórshavn varð í góðveðrinum í morgun farið niðan í Viðarlundina, har løgmaður legði krans við minnisvarðan, og próstur bað eina bøn.

### Ein skipaherur

Løgmaður, sum er Bjørn Kalsø, nú Jóannes Ejdesgaard er burturstaddur, byrjaði røðu sína við at endurgeva úr rámandi yrkingini hjá mæta skaldinum, Christiani Matras, ið hann nevnir ”Viðoy”. Í yrkingini lýsir skaldið oynna sum eitt skip:

*”Sigl, oyggj, fram úr mjørka, nú ert tú eitt skip*
*og tindarnir siglutrø,*
*tú stevnir í veldiga heimin út*
*við høgum og fjallarøð*

*Nú brýtur frá stevni við Enniberg,*
*og við Nánestanga er hvítt.*
*Enn liggur tú fremst í skipaheri,*
*har streymurin rennur strítt”.*

- Hendan oyggin liggur fremst í skipaheri; og skipaherurin er land okkara. Hetta landið við stórum og smáum skipum, hvørt við sína lið, stevnir út í tann veldiga heim, út úr mjørkanum, út úr nærleikanum og út á tað veldiga havið.

Løgmaður helt, at væl eru orðini hjá skaldinum vald – og myndin rámandi.

- Landið er í sínum grundvølli ein skipaherur – ja, ein herur og ikki ein skipafloti, tí júst ein herur verjir fólk sítt, verjir hin dýra farmin umborð, sum yrkjarin tekur til í sínum síðsta ørindi:

*”Og fuglaringar um stavn og bógv*
*teir lívga upp urð og skor.*
*Og fólk og fæ og spógvamál*
*er hin dýri farmur um borð”.*

Løgmaður legði dent á, at víst er farmurin umborð dýrur.

- Fólk okkara er eitt harðbalið fólk, sum útvegaði sær eitt harðvunnið fæ. Hesin skipaherur við dýrum farmi umborð bygdi land í øldir, og enn í dag byggja vit land við sama góða fólki og sama dýra fæi, tí hjá fiskiveiðisamfelagnum er hjallurin á sjónum.

Hann vísti á, at hóast sjóferðslan innanoyggja minkar, nú bátar verða avloystir av vegum, tunlum og undirsjóvartunlum, so verða okkara fiskiskip og sjóferðslan til útheimin tó verandi.

- Tí, Føroyar eru og verða verandi ein skipaherur, har streymurin rennur strítt.

### Stóra virðing

- Sjómaðurin, sum umboð fyri Føroya fólk, hevur stóra virðing millum manna. Hann hevur eina serliga støðu í fólki okkara, tí eingin annar bólkur í samfelagnum hevur í øldir vunnið landinum slíkt fæ og lagt so nógv fyri sum sjómaðurin.

Løgmaður segði, at viðurkenning fólksins vísir seg í øllum løgum samfelagsins, sum hann tók til.

- Bæði í lívi og deyða, í dag á allahalgannadegi og gjøgnum alt árið, legði hann aftrat.



Hann vísti á, at í lívi vísir viðurkenningin seg víða hvar – og á ymiskan hátt.

- Sjómanskirkjan, sum virkar um allan heim, hevur í morg ár verið okkara forlongdi armur, ið røkkur hagar, vit sjálvi ikki røkka. Sjómansheimi, bæði heima og úti, hava tikið væl ímóti mongum sjómanni – og til stóru høgtíð okkara, jólini, senda sjómanskvinnuringarnir um landið trúliga jólapakkar til sjómenninar.

Bjørn Kalsø vísti á, at við tøknini hava miðlar latið upp fyri nýggjum møguleikum at røkka sjómannin.

- Í útvarpinum hevur sjómaðurin havt sína serligu sending, ”Kvøðuljómar til sjófólkið”, sum í mong ár hevur borið sjómansins heilsu – og eitt tað nýggjasta í telduøldini er sjópostur, sum er ein teldupósttænasta til sjófólk.

### Tvey almenn støð

- Jú, víða røkka armar út í heim, og fjálgar eru tær hendur, ið tøtast til jóla – alt fyri at veita sjómanninum í longsli sínum eina heilsan heiman. Allar hesar hendur, ið standa aftanfyri sjómannin, eru tann dýri farmurin umborð, ið ikki kann virðismetast nóg høgt.

Løgmaður legði aftrat:

- Í deyða minnast vit sjómannin á hesum almenna degi – allahalgannadegi – við flagginum á hálvari stong og minningarrøðum kring landið við kranslegging, eins og kirkjur hava minningargudstænastu í kvøld.



*- Landið er í sínum grundvølli ein skipaherur – ja, ein herur og ikki ein skipafloti, tí júst ein herur verjir fólk sítt, verjir hin dýra farmin umborð, sum mæti yrkjarin, Christian Matras, tekur til í síni yrking*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*